

*Fleirstráluekkoloddið ger, at dýpdarmátingarnar eru munandi neyvari enn tær hava verið*

# LV kannar sund og firðir

**Í ársfrágreiðing síni sigur Landsverk millum annað, at teir tey seinastu nógvu árini hava kannað dýpið í firðum og sundum til sjókortframleiðslu og havnagerð, men í fjør byrjaði eitt nýtt tíðarskeið í sjóuppmáting**

ÁRSFRÁGREIÐING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er nútímans tøknin, sum nú ger tað møguligt at gera uppmátingar á sjónum við 100% dekningi. Úrslitið er mest líkt fotografiskum myndum, sum lýsa havbotnin heilt niður í smálutir.

Nýggja tøknin er ein fleirstráluskipan, sum ein AWI 570 bátur hjá Landsverk nú er útgjørdur við.

Fleirstráluekkoloddið mátar í túsundatali av punktum í einari breiðari ál av havbotninum undir bátinum. Álin er umleið 3,5 ferðir so breið sum dýpið, ið mátað verður.

Av tí at mált verður í einari viftu av ekkoloddstrálum undir bátinum, eru uttastu strálurnar serliga viðbreknar fyri rørslu í sjónum. Tí er neyðugt at staðfesta alla rørslu við einum sokallaðum gyro- og rørslumátara. Tvær teldur í bátinum skráseta og viðgera ta stóru mongdina av mátpunktum og tilhoyrandi upplýsingum.

Nýggja tøknin tryggjar, at Landsverk nú lýkur øll krøv, ið havna- og altjóðamyndugleikar seta í sambandi við sjóuppmáting. Við hesum amboðum verður dygdin á eftirlitinum í sambandi við nýbyggingar og viðlíkahald eisini munandi betri.

## Talgild eftirgerð

Sjóuppmátingar verða harumframt nýttar sum grundarlag undir eftirgjørdum streym- og aldumodellum.

Landsverk hevur seinastu árini miðvíst arbeitt við at menna førleikan í sambandi við talgilda eftirgerð av streym- og alduviðurskiftum, sum oftast verður nýtt til at dygdartryggja verkætlanaruppskot, so at til dømis ein brimgarður fær røttu hæddina, rætta skapið og røttu leguna.

Talgildu modellini verða somuleiðis nýtt til eftirgerð av aldu og sjóvarfalli kring Føroyar og til framleiðslu av forsagnum. Royndirnar við eftirgjørdu modellunum vísa samsvar millum hesar og fysisku modellroyndinar. Eftirgjørdu modellini er góð og bílig í mun til sera kostnaðarmiklu modellroyndirnar, skrivar Landsverk millum annað í ársfrágreiðing síni.



*Her sæst Ólavur Gregersen á havsins botni*